# Ove Ritter fingið »Forsvarets Medalje«

Hósdagin í farnu viku var hátíðarhald á Flyvestation Værløse, har starvsfólk hjá flogvápninum fingu Forsvarets Medalje frá verjuovastanum, Hans Jesper Helsø, generali.

Millum hesi fólk var eisini Ove Ritter, sum er dani, men sum býr í Havn saman við føroysku konu síni við familju.

Ove Ritter, sum er seniorsersjantur, fekk »Forsvarets Medalje« fyri innsats sín í Kirgisia, har hann hevur starvast sum vaktarliðsleiðari á øðrum av vaktarliðunum, nevnt Air Movement Control Element (AMCE). Har gingu teir støðugt í 12 tíma vakt í samstarvi við amerikanska flogvápnið og fronsku AMCE-deildina.

Danska flogvápnið setti í januar í ár til taks eitt C-130 flogfar og eina AMCE-støð. Uppgávan var at AMCE-støðin skuldi taka í móti og viðgera øll sløg av luftforsýningum til og frá støðunum í Kirgisia. Síðani skuldu flogfør hjá teimum níggu londunum, sum eru í hesum samstarvi, flúgva forsýningarnar til støðir í Afghanistan.

Heiðurin at fáa »Forsvarets Medalje« var stovnaður tann 27. november í 1991 og verður givin militerum og sivilum persónum, sum hava gjørt ein serligan innsats fyri verjuna uttan fyri Kongaríkið Danmark.





*Ove Ritter í Havn fekk hósdagin »Forsvarets Medalje« frá verjuovastanum, fyri arbeiðið sitt fyri donsku verjuna Kirgisia*

## »Burturhugur« fekk virðisløn í Uppsala

**Filmurin hjá Teiti Árnason fekk virðislønina »Videosektionens pris«**

VIRÐISLØN
*Tíðindaskriv*

Heimildarfilmurin hjá Teiti Árnason, »Burturhugur - faroese observations«, sum lýsir lív og umstøður hjá nøkrum fólkum í Hattarvík, varð frumsýndur á listastevnuni í Norðurlandahúsinum 2001.

Síðani hevur hann verið sýndur á fleiri listastevnum, nú um mánaðarskiftið oktober-november á »Nordische Filmtage« í Lübeck og á »Uppsala Internationella Kortfilmfestival«. Á hesi seinnu stevnuni fekk filmurin virðislønina »Videosektionens pris«.

Fyrispurningar um Hattarvíkar-filmin eru komnir úr Torino í Italia og úr París. Í vetur verður hann sýndur í íslendska ríkissjónvarpinum.

# Bent var Laugmester 2001

*Slaktarahandilin hjá Bent Lilholm Nielsen í Vanløse vann heiðurin sum besta kjøt- og viðskerabúð í Keypmannahavn í 2001. Bent er hálvur føroyingur*






Slaktarin á Jydeholmen í Vanløse, Bent Lilhom Nielsen, varð í fjør av »Kjøbenhavns Slagterlaug« kosin ársins »Laugmester for særlig indsats«.

Heimildarmaður okkara fekk eygað á diplomið, sum hongur í handlinum – og sum óivað er dýrur lutur hjá ognarmanninum. Tað er sum viðurkenning fyri sera framkomna kjøt- og viðskerabúð, at hann hevur vunnið heiðurin.

Bent var í læru hjá pápanum, Henning Lilholm Nielsen, slaktarameistara, sum hevði slaktarahandilin, til Bent tók yvir. Pápin doyði í 1993. Henning var fyristøðumaður í kendu kjøt- og viðskerabúðini, Smæruni, á Abbatrøð í Havn í mong ár eftir krígslok, til hann og konan, Judith, í 1953 búsettust í Keypmannahavn.

Myndin sýnir Bent í kjøt- og viðskerabúðin í Jydeholmen. Mamma Bent er úr Leynum úr fittliga stórum barnaflokki, hon vaks upp í Havn. Hittir tú Bent, tosa bara føroyskt, tí tað skilir hann.

Á myndini er skyldkonan, Birita, hon hevur bílagt tað, sum grýtuklárt skal á jólaborðið í vøggustovuni á Vester Fælledvej á Vesturbrúgv, har hon er deildarleiðari.

# Stamen og Yurij – ferhent klaver

KONSERT
*Norðurlandahúsið*

Annað tiltakið í skránni hjá Orfeusi í vetur verður við klaverleikarunum báðum Stamen Stantchev og Yurij Penev. Teir fara at spæla ferhentan klavertónleik í Norðurlandahúsinum og í Vestmanna.

Stamen Stantchev varð føddur í Assenovgrad í Bulgaria og tók útbúgving sína av tónlistarskúlanum í Plovdiv. Seinni hevur hann tikið LRSM-prógv úr Onglandi. Stamen er fjølbroyttur tónlistarmaður, hevur spælt rokk, klassiskt, jazz og hevur m.a. skrivað tónleik til nakrar av leikunum hjá Grímu. Í 2002 kom út "Klaverbókin hjá Stamen". Hetta er savn við føroyskum løgum, hann hevur útsett fyri klaver.

Yurij Penev er somuleiðis ættaður úr Bulgaria - føddur í Shumen. Hann tók útbúgving í tónlistar-námsfrøði á lærda háskúlanum í heimbýnum. Hann starvaðist í fleiri ár í Noregi, bæði sum tón-leikari og klaverlærari. Síðan á heysti 2001 hevur hann undirvíst í klaverspæli í Føroyum.

Eisini í Vestmanna

Ferhenta skráin hjá Stameni og Yurij fevnir m.a. um verk eftir Diabelli og Fauré, umframt Ragtimes eftir Scott Joplin. Konsertirnar verða í Norðurlandahúsinum mikukvøldið 13. november kl. 19.30 og í Vestmanna skúla sunnudagin 17. november kl. 17.00

### Næsta konsertin í Dali

Næsta Orfeus konsertin verður eftir ársskiftið, tá limir úr Aldubárini fara at spæla í Eiriksgarði í Dali hin 9. februar og í Norðurlandahúsinum hin 12. februar.



# Ein kókibók til Føroya fólk

**Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur nú út kókibók hjá okkara kokki, Guðmund Guðmundssyni**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*




*Okkara kokkur, Guðmundur Guðmundsson hevur gjørt eina kókibók, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Okkara kokkar hava verið á skránni hjá Sjónvarpi Føroya í fimm vetrar nú. Og er tað frá hesi matsendingini, at vit kenna okkara kokk, Guðmund Guðmundsson.

– Ígjøgnum hesi fimm árini eru nógvar ymiskar uppskriftir komnar undir land, og fleiri hava eisini spurt meg, hví eg ikki havi gjørt eina kókibók burturúr tí, sigur Guðmundur Guðmundsson.

Og nú er ein kókibók so komin burturúr. Ein kókibók við 61 uppskriftum. Døgurðarættir, dessertir, salat, forrættir og annað er innihaldið í bókini. Eisini eru uppskriftir til mat við lágum fiti.

Sjónvarpskokkurin leggur dent á, at allar uppskriftirnar eru bara uppskot til, hvussu tað kann gerast. Ongin sigur, at tí kókibókin sigur, at tað skal vera soleiðis, at tað eigur at verða soleiðis.

Bókin er bygd upp á tann hátt, at á hvørjari opnu eru litmyndir. Ein mynd av liðugt gjørda rættinum, umframt myndir, ið vísa ein part av mannagongdini. Har afturat eru ymsar aðrar uppskriftir til salat og breyð og annað, tó uttan myndir.

### Strævið

Per á Hædd hevur tikið allar myndirnar til bókina, og sigur Guðmundur, at uttan Per hevði bókin ikki verið til.

– Eg havi eisini fingið ótrúliga hjálp frá Bókadeildini, og har hava tey verið ótrúliga hjálpsom, sigur Guðmundur.

Myndirnar og rættirnir vórðu gjørdir í summar á Gamla Apoteki. Ein heil vika, har átta tímar um dagin vórðu brúktir til at gera mat og taka myndir.

Nú er bókin so komin til landið og í gjár á døgurða borðreiddi kokkurin við fimm ymsum rættum úr bókini í Hornahúsunum í Havn.

– Eg eri ógvuliga glaður fyri úrslitið. Hetta er ein bók, sum alt Føroya fólk kann fáa gleði av, og eg kann róliga siga, at tað er alt stríðið vert, sigur okkara kokkur.

– Tað er ein ótrúlig kensla, at endiliga hava bókina í hondini. Eg havi glett meg fantastiska nógv til bókin kom – nógv meira enn eg helt, at man kundi gleða seg til eina bók.

Okkara kokkur sigur eisini, at vónandi er hetta bara fyrsta bókin í eini røð. Hann hevur longu ætlanir um, at møguliga fara at geva fleiri kókibøkur út, men tað er jú ikki bara sum at siga tað.

Men í fyrsta umfarið fegnast Guðmundur um góða úrslitið hann og Bókadeildin til felags eru komin við.

Bókin er nú til keyps í bókhandlunum kring landið.

